## UTTAN ÚR HEIMI

### Minningarhald í Screbrenica

Fleiri túsund muslimar úr øllum Bosnia komu saman sunnudagin at minnast tey, sum lótu lív undir hópdrápinum í býnum fyri tíggju árum síðani.

Samstundis vórðu leivdirnar av 338 monnum og dreingjum jarðaðar undir einum hátíðarhaldi stutt uttan fyri sjálvan býin. Leivdirnar vórðu funnar í fleiri hópgravum. Millum tey hjástøddu var Azemina Nuhanovic. Hon segði undir hátíðarhaldinum, at hon hevði vónað at finna bróður sín aftur á lívi, men at hon var komin at fylgja honum til gravar. Bróðurin var 39 ára gamal og var ein av teimum meiri enn 7.000, sum serbar myrdu í Screbrenica.

Síðani borgarakríggið í Bosnia endaði í 1995, hava bjargingarlið funnið meiri enn 60 hópgravir nærhendis Screbrenica. Hópmorðið er tað ringasta í Evropa síðani seinna heimsbardaga.

### Stjórnin tapti

Í Japan tapti tann liberaldemokratiska stjórnin hjá Junishiro Koizumi, forsætisráðharra yvirhúsvalið sunnudagin.

Sunnudagin skuldu japanar manna 121 av teimum 242 sessunum, sum eru í yvirhúsinum. Tann liberaldemokratiski flokkurin fekk sambært teimum seinastu tølunum 51, og tað var minni, enn flokkurin hevði vónað at fáa. Úrslitið ger, at flokkurin hevur tilsamans 115 umboð í yvirhúsinum. Tann størsti andstøðuflokkurin, demokratarnir, hevur nú 82 umboð í yvirhúsinum. Undan valinum sunnudagin hevði hann 70 umboð har.

Stjórnin hjá Koizumi er kortini ikki í vanda, tí hon hevur meiriluta í tí máttmikla undirhúsinum. Eygleiðarar í Tokyo siga tó, at forsætisráðharrin er viknaður, og at valúrslitið kann fáa ávirkan á fleiri nýskipanir, sum forsætisráðharrin hevur verið talsmaður fyri at fremja.

### Seldi ólógligar bátar

Ein danskur bátasølumaður helt, at tað mundi vera skilagott at innflyta bátar úr USA, nú tann amerikanski dollarin er so nógv viknaður í virði, men hann noyðist nú at sanna, at so einfalt er tað ikki.

Jyllandsposturin skrivar, at Sjóferðslustýrið hevur meldað sølumannin til løgregluna. Tað vísti seg, at maðurin hevði fingið tríggjar motorbátar úr USA, og at hann hevði lýst teir til sølu. Men tá Sjóferðslustýrið fór at kanna bátarnar, kom fram, at teir luku ikki treytirnar, sum bátar í Evropa skulu lúka. Eitt nú vóru teir ikki nóg tryggir.

Sjóferðslustýrið hevur seinastu tíðina vitjað fleiri bátasølur á Sælandi fyri at kanna, at allar reglur verða hildnar. Tann, sum brýtur reglurnar, kann fáa bót ella hefti upp til tvey ár.

### Jackson skal tiga

Poppstjørnan Michael Jackson hevur nú fingið boð um, at hann skal ikki siga nakað um sakarmálið, sum myndugleikarnir hava lagt ímóti honum.

Løgreglan í Kalifornia hevur ákært Michael Jackson fyri at hava gjørt seg inn á børn kynsliga, men nú um dagarnar kunngjørdi hann eitt tíðindaskriv, har hann segði, at hann hevur ongantíð gjørt nøkrum barni ilt. Tað vil dómarin Rodney Melville ikki góðtaka, og hann hevur nú givið Jackson boð um at tiga. Tey somu boðini hevur hann givið øðrum, sum hava við málið at gera. Rodney Melville sigur, at ætlar Michael Jackson sær at siga nakað um málið, skal hann spyrja seg fyrst.

Dómarin hevur eisini gjørt av, at øll skjøl í málinum ímóti Michael Jackson skulu haldast loynilig. Tað hevur fingið øði í amerikanskar fjølmiðlar, sum halda, at dómarin roynir at órógva arbeiðið hjá fjølmiðlunum.

# Nú má heimurin vakna




*– Tað er ein æra og ikki ein skomm at tosa um AIDS, segði Kofi Annan, tá hann setti AIDS-ráðstevnuna í Bangkok*

*Mynd: Reuters*

**– Heimsins leiðarar mugu fáa høvdið upp úir sandinum nú, segði ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, tá hann setti altjóða AIDS-ráðstevnuna í Bangkok**

Kofi Annan legði ikki fingrarnar ímillum, tá hann sunnudagin setti altjóða AIDS-ráðstevnuna í teilendska høvuðsstaðnum Bangkok, og hann gjørdi greitt, at allir heimsins leiðarar hava ábyrgd av tí, sum hendir ella rættari sagt ikki hendir á økinum.

– Alt fleiri og fleiri kvinnur hava HIV-virusið í sær, og hetta er ein ræðandi gongd. Kortini hava ein triðingur av heimsins londum ongan politikk, sum verjir kvinnurnar, segði Kofi Annan og legði afturat, at fátækradømi, harðskapur og misnýtsla økja vandan fyri, at kvinnur verða smittaðar.

– Vit kunnu steðga hesari gongdini við at geva gentum og kvinnum betri møguleikar at verja seg ímóti smittuni, segði ST-aðalskrivarin.

Ikki færri enn 17.000 umboð úr 160 londum eru á ráðstevnuni í Bangkok. Millum luttakararnar eru politikarar, granskarar og felagsskapir, og tey skulu teir næstu dagarnar tosa um, hvussu bardagin ímóti AIDS best kann leggjast til rættis.

Hagtøl hjá ST siga, at næstan 40 milliónir fólk eru smittað við HIV, og at teimum búgva umleið 30 milliónir í menningarlondunum. Samstundis vísa tølini, at í teimum fátæku londunum fáa bara ein brotpartur av teimum sjúku heilivág.

Framrokningar siga, at innan 2010 kunnu 48 milliónir fólk fara at doyggja av AIDS, og at talið kann koma upp í 74 milliónir innan 2015.

– Leiðarar í øllum heiminum eiga at vísa, at tað er ein æra og ikki ein skomm at tosa um AIDS, segði Kofi Annan við teir 17.000 luttakarnar.

# Vanunu vil sleppa úr Ísrael

**Ísraelski kjarnorkuteknikarin Mordechai Vanunu vil nú sleppa at flyta úr Ísrael. Tað skal hægstirættur taka støðu til**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann 21. apríl slapp Mordechai Vanunu úr einum ísraelskum fongsli. Tá hevði hann sitið har í átjan ár, tí hann hevði avdúkað partar av tí sera loyniliga ísraelska kjarnorkuútbúnaðinum.

Síðani hann kom útaftur, hava myndugleikarnir sett honum forboð fyri at siga nakað sum helst um ísraelska kjarnorkuútbúnaðin. Hann sleppur heldur ikki av landinum at ferðast, og hann hevur eisini fingið forboð fyri at tosa við útlendsk tíðindafólk.



*Mordechai Vanunu avdúkaði tað ísraelska kjarnorkuloyndarmálið. Nú vil hann sleppa av landinum*

*Mynd: Reuters*

Men nú vil hann sleppa úr Ísrael. Norski sakførarin Fredrik Heffemehl, sum leingi hevur roynt at hjálpa Vanunu, sigur við norsku tíðindastovuna NTB, at Mordechai Vanunu hevur ongar møguleikar at liva eitt vanligt lív í Ísrael aftan á fongsulstíðina. Nógvir jødar hata hann, tí hann avdúkaði loyndarmálið um landsins kjarnorku. Tað fekk hann eisini at kenna, tá hann sunnudagin kom í hægstarætt, tí uttanfyri róptu fólk rakstrarróp eftir honum.

Ísraelskir eygleiðarar vænta ikki, at hægstirættur fer at lata Vanunu sleppa av landinum, tí ísraelska stjórnin hevur sagt, at hann er framvegis ein vandi fyri landið.

Viðgerðin í hægstarætti er eisini fullkomiliga loynilig. Tá Vanunu hevði lagt síni sjónarmið fram, fekk hann boð um at fara út. Síðani greiddu myndugleikarnir rættinum frá sínum sjónarmiðum. Tann frágreiðingin tók tveir tímar, men Vanunu fekk ikki at vita, hvat myndugleikarnir høvdu sagt.


